# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Pauli í Sandagerði 50 ár



Í dag, fríggjadagin 28. januar, verður Pauli í Sandagerði 50 ár. Hann er havnarmaður, og vaks upp í Hoydølum, har foreldrini vóru kostlærarar, men seinastu árni hevur Pauli búð á flatlondum. Pauli er kendur úr føroyska tónlistaumhvørvinum, og tónleikurin hevur havt við sær, at navnið á føðingardagsbarninum er vorðið kent langt út um landoddarnar.

Foreldrini hjá Paula eru Elin og Ásmundur V. Johannesen. Pauli er elstur av trimum systkjum. Hini eru Anna og Sjúrður. Í 1974 leyk Pauli studentsprógv í Hoydølum, og í 1980 tók hann læraraprógv á Føroya Læraraskúla. Nógvu tey fyrstu árini var Pauli lærari í Eysturskúlanum. Ein part av skúlaárinum 1995-96 vann hann lærari á Øster Farimagsgades skole í Keypmannahavn, og síðani síðst í níti árunum hevur hann búð á Vejle leiðini, har hann er lærari. Hann arbeiðir bæði í einum privatskúla og í musikkskúlanum í Vejle.

Í fleiri enn tríati ár hevur Pauli stjórnað fleiri kórum, og hann fæst framvegis við kórleiðslu. Millum kórini, sum hann hevur staðið á odda fyri, eru gentukórið Cantabile. Mest kendur man hann kortini vera sum ein tann fyrsti og fremsti føroyingurin, sum hevur komponerað og sett út nýmótans tónleik fyri kór og orkestur. Tónleikurin hjá Paula, sum frá blaðungum av hevur spælt klaver, fevnir víða. Hann hevur eitt nú komponerað rokktónleik, fólkatónleik, sonatir, oratoriir, klavertónleik, kamartónleik og tónleik fyri symfoniorkestur.

Millum verkini hjá Paula eru eitt nú Jesus og Makedonarin, sum hann skrivaði tónleikin til, meðan Sigmund Poulsen gjørdi tekstin. Hetta arbeiðið varð gjørt í sambandi við, at Havnin hátíðarhelt 75 ára dagin sum keypsstaður. Eitt annað kent verk hjá Paula er Landið, og so er tað Tango non Argenti, sum telist millum verkini, ið hann er virðisløntur fyri. Hetta verkið komponeraði hann í sambandi við Jacob Gade festivalin í Danmark í 2002.

Verkini hjá Paula í Sandagerði eru framførd í Asia og Amerika og í Europa úr Norðurnoregi og suður til Grikkalands. Skúlaárið 1987-88 búði Pauli í Grikkalandi, har hann las og skrivaði tónleik.

Fyrrapartin av áttati árunum var Pauli millum teirra, sum tók stig til at skipa mentanarlívið í Føroyum. Millum tað, sum hann var við til at fáa upp at standa, kunnu nevnast LISA, Ljósritagrunnurin, Fjølrit, Felag fyri tónleikarar og felagið fyri føroysk tónaskøld.

Pauli býr saman við Lenu Jensen. Tey bæði eiga tvær gentur - Maria og Laura. Frammanundan eigur Pauli fýra dreingir - Ásmund, Sverri, Jóannes og Sjúrður.

### Diamantbrúdleyp

Í dag, 28. januar hava Lena og Anton Petersen, Rituvík, diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

### Smaragdbrúdleyp

Í dag, 28. januar hava Diana og Alfred Klein, Fuglafirði, verið gift í 55 ár – smaragdbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

### 70 ára føðingardagur

Leygardagin 29. januar verður Adelborg Linklett, Klaksvík, 70 ár. Dagurin verður hildin í Skálanum frá kl. 19.00.

### Dagurin

**28. Januar. Karlamagnus keisari**, deyður í 814. Eini 400 ár eftir deyða sín varð hann eftir uppskoti frá týska keisaranum Fríðriki Barbarossa skírdur halgimenni, men heitið varð ikki viðurkent av pávanum í Róm. Karlamagnus hevur annars verið høgt í metum, ikki minst í Føroyum.

Karl er germanskt navn og merkir *maður*, og Magnus er latínskt og merkir *stórur*.

---

## So tagna røddir
## – Í kvirruni býr longsul –

At blíva eldri er eisini at siga oftari farvæl. - Tú venur teg kortini ongantíð til at siga hesi tvey orðini "far væl" fyri seinastu ferð.

Kirkjurnar eru pyntaðar og prestar geva troyst í neyðini. Vit drýpa høvur og takka fyri ritualini at kunna fylgja teimum vit kenna og eru góð við til seinasta hvíldarstaðin.

Prestur, deknur, klokkari og organistur geva okkum eina løtu í kirkjuni har vit saman lurta eftir troystarorðum og syngja sálmar. -

Fríggjadagin 7. januar 2004 var ein sorgarinnar dagur á Almannastovuni. Vit fylgdu einum fyrrverandi starvsfelaga frá Vesturkirkjuni og søgdu orðini "Far væl"

Sama dagin henda fríggjadagin í januar fingu vit eisini boðini, at tvey fólk av okkara arbeiðsplássi andaðust, og vit stóðu enn einaferð fyri at fylgja starvsfeløgum til seinasta hvíldarstaðin.

Rói Árting, Beinta Joensen og Minna Jacobsen, sum øll trý høvdu sosialráðgevara útbúgving og virkaðu í hesum yrki ,vóru leiðbeinarar hjá mongum og vóru góðir starvsfelagar. Tey settu stór krøv til sín sjálvs at vera ráðgevar og veita viðskiftafólkum stuðul og leiðbeining í lívsins truplu viðurskiftum.

Nú vit dvølja við sorgina fara tankarnir eisini til tykkum, sum hava mist Ednu Thomassen, sum somuleiðis hevur arbeitt saman við okkum. Ì sínum arbeiði sum málsviðgeri var hon nærløgd og dugnalig.

Vit sum kendu hesi dugnaligu og røsku fólk eru sorgarbundin. Vit syrgja saman við tykkum, sum stóðu teimum næst.

Tað eru løtur í lívinum, har evnini ikki røkka at fata tað, sum veruleikin bjóðar.

Vit lýsa frið yvir minni um góðu starvsfelagar okkara, og biðja um styrk til at fáa samanhang aftur í tilveruna.

**Starvsfelagar á Almannastovuni**

---

**Hjørleif Enni**
**keypmaður, Tvøroyri**

andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi
onsdagin 26. januar, 88 ára gamal.

Kistan fer úr kapellinum fríggjakvøldið kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju
leygardagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*

**Inger,**
**Helgi, Birgir og Tórður**

Tey, ið vilja minnast Hjørleif, kunnu lata eina gávu
til stovnan av eldrabýli, konto í Føroya Banka.

---

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara elskaða kona, mamma, omma og vermamma

**Elisa Frederikke Lamhauge**
**Kollafjørður (ættað úr Lamba)**

andaðist á Landssjúkrahúsinum 24. januar,
62 ára gomul.
Bønarhald verður í kapellinum á Landssjúkrahúsinum
hósdagin 27. januar kl. 18. 00.
Jarðarferðin verður úr Kollafjarðar kirkju
fríggjadagin 28. januar kl. 14.00

*Fyri tey avvarðandi*

**Berint, Alma, Beinta og Brynleif**